# Føðingardags TILBOÐ

**Vit fylla 25 ár og lata 25% av øllum vørum hósdagin 26. nov.**

**OPIÐ ER HÓSDAGIN LÍKA TIL KL. 20**

SONJA DESIGN

Stoffalág 41 · Tel 314979 · www.sonjadesign.fo

---

# HÚSALÁNSGRUNNURIN

## Sóknast eftir starvsfólki til málsviðgerð og bókhaldið

Umsøkjarin skal kunna virka og flyta millum avgreiðslu, málsviðgerð og bókhaldið.

**Málsviðgerin**
Umfatar øll viðurskifti í sambandi við lánsumsóknir og samskifti við viðskiftafólk grunnanna, herundir samskifti við aðrar peningastovnar, advokatar og tinglýsing.

**Bókhaldið**
Umfatar allar vanligar bókingar, dagføringar og at eftirkanna kontur

**Avgreiðslan**
Avgreiðslan umfatar í høvuðsheitum:
- Passa vekslaran
- Umsiting av skjalasavninum
- Umsiting av postinum

Nakað av vanligum skrivstovuarbeiði.

**Førleikar**
Tú skalt hava eina viðkomandi útbúgving í skrivstovuyrkinum og innan bókhald, og hava góð evni at samstarva og samskifta, bæði við tínar starvsfelagar og við kundar.

Ein fyrimunur er, at tú hevur kunning innan fíggingarøkið.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið umfatar Húsalánsgrunnin o.a.

**Nærri fæst at vita**
Fyrispurningar um starvið fáast við at venda sær til Páll Poulsen, stjóra tlf. 31 45 83 ella 22 15 62

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 15. desember 2009, og starvið verður sett skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn saman við CV, prógvum og øðrum viðkomandi skjølum, skulu sendast til:

**Húsalánsgrunnurin**
Yviri við Strond 6
Postsmoga 215
110 Tórshavn
Merkt: Starvslýsing

**UM HÚSALÁNSGRUNNIN O.A.** Húsalánsgrunnurin o.a. eru undir eftirliti landsstýrismansins, men verður fyrisitin av einum stýri við 3 limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir fyri 4 ár. Húsalánsgrunnurin umsitir eisini Bjálvingarstuðulslánsgrunnin, Íbúðagrunnin og rentustudning til samansparing til sethúsabygging. Húsalánsgrunninum veitir lán til sethúsa- og íbúðabygging og keyp. Bjálvingarstuðulslánsgrunninum veitir stuðulslán til bjálving og orkusparandi tiltøk til fólkapensiónistar sum búgva í egnum húsum ella íbúð. Íbúðaðagrunninum hevur til endamál, at fremja og stuðla kommunum, feløgum og stovnum at útvega og reka íbúðahús eftir serligum reglum. Rentustudningsskipanin hevur til endamál at veita rentustudning úr landskassanum til samansparing til sethúsa- og íbúðabygging ella keyp og til at keypa grundstykki til húsa- ella íbúðabygging.

---

VÁGA KOMMUNA

## Frá Vága Kommunu

Skattalistin fyri Miðvágs- og Sandavágs kommunur árið 2008, liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í Sandavági í arbeiðstíðini frá mánadegnum 30/11 til og við mánadagin 14/12-2009.

**Vága kommuna**

---

**Fjeppari? Les um ítrótt í Sosialinum**



---

www.ebenezer.fo

## SUNNUDAGSSKÚLIN

í Ebenezer er byrjaður aftur

**Øll eru hjartaliga vælkomin!**

HVØNN SUNNUDAG KL. 12.00



EBENEZER

---

## Matseðil

Hósdagin 26. november
**Svínakambur / Grýturættur**

Fríggjadagin 27. november
**Stoktur medistari / Lasagna / Nakkafillét**

Leygardagin 28. november
**Rullusteik**

Mánadagin 30. november
**Fiskafat / Forlorin hara**

Týsdagin 1. desember
**Bollar í Karry / Kókað neytakjøt**

Mikudagin 2. desember
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**

---

## Jólafundur

Jólafundurin fyri limir FK's í handlunum í Dr. Jacobsensgøtu og í Hoyvík verður í Pálsstovu hóskvøldið 26. november 2009 kl. 19.30.

Á skránni verður m.a. burturluting, undirhald og sangur.

Allir limir eru vælkomnir.

Limanevndin

**Føroya Keypssamtøka**

---

**Lesið Sosialin so eru tit við**

---

## Jólasølan í Kvívík

**Verður í Glæmuni 28. novembur frá kl. 14 til 19.**

**Tey, ið ynskja at verða við, kunnu ringja tlf 211490 ella 212442**



**Bygdarfelagið Glæman**

---

## Landsfundur Fólkafloksins

**Landsfundur Fólkafloksins verður leygardagin 28. november á Hotel Hafnia í Tórshavn.**

www.folkaflokkurin.fo